## Ð-blaðið aftur á gøtuna í 2009

Tað einasta erotiska blaðið í Føroyum kemur nú aftur á gøtuna. Saknurin hevur allarhelst verið stórur, men nú er føroyska Ð-blaði aftur ávegis. Jógvan á Høvdanum yngri váttar fyri Rás2, at hóast Ð-blaði ikki hevur verið útgivið í eina tíð, so er ætlanin at blaði skal koma út aftur á gøtuna í 2009. Jógvan sigur, at tørvur er á slíkum blaði, og at undirtøkan hevur verið ótrúliga stóra.
- Í byrjanini var trupult at fáa kvinnur at verða við í blaðnum, men síðan tann fyrsta útgávan kom út er hugburðurin grundleggjandi broyttur, og kvinnur eru meira jaligar nú enn tær vóru í byrjanini, sigur Jógvan á Høvdanum. Enn er ikki greitt júst nær fyrsta Ð-blaðið í 2009 kemur út.



## 1,9 mió. arbeiðsleysir bretar

Arbeiðsloysið í Bretlandi er nú komið upp á 6,1 prosent, og so stórt hevur tað ikki verið síðani í apríl í 1999. Í hesum mánaðinum er talið á arbeiðsleysum farið upp um 1,9 millión, og tann seinasta mánaðin er talið á teimum, sum fáa stuðul vegna arbeiðsloysi, vaksið næstan 80.000, sigur Sky News. Seinastu tríggjar mánaðirnar eru 225.000 komin afturat á listan fyri arbeiðsleysum bretum. BBC sigur, at arbeiðsloysið veksur skjótari millum kvinnur enn menn.

# u eiga tørn

sigur hon.
- Vit vita enn ikki hvat vendir upp og hvat vendir niður. Alt er so óstabilt, og nógvir leysar endar eru, ið vit skulu hava greiði á. Alla ta tíðina, eg havi sitið í býráðnum, hevur tað bara gingið upp og frameftir, sigur Gunvá við Keldu.

### Tey eldru og alternativir bústaðir

Hon ivaðist onga løtu í at taka av, tá valúrslitið vísti, at Fólkaflokkurin fekk flestar atkvøður á valinum, við henni sjálvari sum toppskorara.
- Eg ivaðist onga løtu. Eg fekk flestar atkvøður, og eg kendi tað sum eina álitisváttan. Tað er eitt álit, sum eg skal liva upp til.
Men tíverri verður ikki rúm fyri stóru íløgunum, undanfarna stýrið gjørdi. Nú skal strammast í.
- Men eg havi hugsað, at kanska er júst hetta styrkin hjá kvinnunum. At fáa nógv burturúr ongum. Her spælir psykan inn, trúgvi eg. Kvinnurnar tora og duga at arbeiða uttan at skula vísa vøddar, sum mennirnir ofta gera.
Komandi tíðin er uppløgd at nýta til at leggja ætlanir um stórar íløgur, og hetta fyrsta árið skal nýtast til at finna stevið í samgonguni. Og borgarstjórin í Klaksvík er ikki í iva um hvør bólkur nú stendur fyri tørni. Tað eru tey eldru í samfelagnum, sum eisini hevur verið eitt økið, hon hevur viljað stríðst fyri, meðan hon hevur sitið í býráðnum. Seinastu árini hevur kommunan bjóðað út grundstykki, bygt barnagarð og í løtuni er skúlabygging í gongd. Nú standa tey gomlu fyri tørni, og ein av møguleikunum er at bjóða út alternativan bústað til eldri fólk, ið ikki orka at taka sær av stóra urtagarðinum, ella ikki megna trappurnar ella reingerðing av mongu rúmunum longur. Og her er tað av stórum týdningi at mann letur rætta málbólkin vita, at mann arbeiðir við tí. Eisini er arbeiðsbólkur settur at gera eitt álit um kommunureform. Hetta merkir, at vit innan stutta tíð, eisini innan eldraøkið, fáa at vita hvat liggur í kortinum. Her mugu vit vera tilreiðar, við ætlanum um loysn viðvíkjandi plássum til røktarheim, ellisheim, sambýli og øðrum til eldri.
- Tey gomlu í dag eru ikki von við at krevja nakað. Tí er tað uppgávan hjá okkum í kommununi at upplýsa tey um at ein loysn er á veg, og lata tey vita at vit arbeiða fyri tey.

### Samstarv skal útnyttast

Umframt eldraøkið, saknar borgarstjórin eitt fjølmentað hús, sum egnar seg til framførslur av ymiskum slag. Eitt konserthøli, sum samstundis kann bjóða út útbúgving innan tónlist, og kann forbarma seg yvir sjónleikararnar í býnum. Harafturat saknar hon eina yvirornaða ætlan fyri miðbýin. Eina ætlan, har rúm er fyri estetikki, og borgarin verður innblandaður, eitt nú við at skipa fyri borgarafundum. Somuleiðis heldur nýggi borgarstjórin í kommununi allar dyr opnar fyri samstarvi við grannakommunurnar í arbeiðnum at menna kommununa.
- Vit mugu duga at útnytta samstarv. Bæði við grannakommunur og vinarbýir, og royna at savna tað tilfeingi, sum er. Um føroyingar skulu koma aftur, mugu vit samansjóða tær eindir, býurin hevur, og gera hann lokkandi.
Sum er, stendur fólkatalið í Klaksvík í stað. Fyrst mangladu grundstykkini, og nú manglar figgingin. Og borgarstjórin ásannar, at fakliga og fíggjarliga eru ikki somu møguleikar í kommununi í dag.
- Men eg eri positiv. Tað er givið, at vit líta á fiskivinnuna, men vit eru fyrr komin aftur í aftur. Kósin kemur aftur í aftur, spurningurin er bara hvussu. Her hava vit við fleiri ókendar faktorar at gera við fiskaprísum og veðri.

### Sólin fer eina ferð aftur at skína

Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu hevur brotið upp um armar. Reklamuvirkið, hon var stjóri fyri og enn eigur part í, hevur lagt saman við øðrum virki, og hon hevur innsæð, at nýggja starvið fer at krevja nógva tíð og orku. Vónandi kann hon halda fram við sanginum, sum fyllir nógv í hennara lívi, men hon hevur kortini sligið seg til tols við, at okkurt helst má víkja.
- Fyri meg persónliga er tað umráðandi at kunna kobla úr. Tað er bara gott fyri høvdið. Eg trívist ikki við at arbeiða alla tíðina. Eg havi seinastu árini sungið nógv, og mær dámar væl at ganga túrar og so framvegis. Okkurt fær helst ikki ta tíðina, sum fyrr. Men eg má siga, at eg eri spent uppá uppgávurnar, ið fylgja við borgarstjórastarvinum. Mær hevur altíð dámt væl eina góða røðu til dømis. Eg ikki eri nakar garvaður røðari sjálv, men tað lærir mann helst. Fyri meg vil tað vera tað mest umráðandi at persónligheitin skínur ígjøgnum í eini talu, heldur enn at lesa eina talu upp, sum onkur annar hevur skrivað.
Gunvá við Keldu tekur samanum, og metir tað vera gott fyri okkum menniskju at steðga á eina løtu. Sleppa tí materialistiska eina løtu. Samstundis kennir hon týdningin av ikki at mála tað so svart fyri borgararnar í kommununi, sum júst nú trongja til ein sterkan skipara.
- Eina ferð fer sólin at skína aftur, sigur Gunvá við Keldu.

